# John er einsamallur á odda

**FM kappingin á Toftum er fyri stóran part myndað av veteranum, meðan eingin útiseti luttekur hesa ferð**


*John Rødgaard hevur lagt seg einsamallan á odda, nú trý umfør eru leikt í landsliðsbólkinum*

FM Í EINSTAKLINGATALVI
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er nógv lív í, tað er stórur spenningur, men kortini er tað næstan fullkomiliga friðarligt. Hetta ljóðar ivaleyst sum mótsøgnir, men soleiðis hongur hetta saman. Tað er FM kappingin í talvi fyri einstaklingar, sum vit tosa um. Kappingin er á Toftum í hesum døgum. Fyrsta umfarið var á skránni leygardagin. Tvey umfør vórðu telvað sunnudagin, eitt var á skránni í gjár, tað verður aftur telvað í dag, og leygardagin ella páskaaftan verður greitt, hvør tað næsta árið fer at bera heiðurin sum føroyameistari í talvi.

Sum tað plagar at vera, so er tað eisini hesa ferð, at tað eru teir tíggju við hægsta styrkistalinum, sum luttaka í kappingini, ið mynda landsliðsbólkin. Eyðkent fyri kappingina hesa ferð er tað, at eingir útisetar luttaka. Teir hava annars verið rættuliga trúgvir og drúgvir tey seinnu árini.

Tá ið útisetarnir ikki eru við, hevur tað við sær, at nakrir av teimum, sum eru hægst á styrkislistanum, ikki kappast um føroyameistaraheitið. Av teimum tíggju ovastu á styrkislistanum eru fimm ikki við í FM kappingini. Teir eru teir tríggir ovastu – John Arni Nilssen, Heini Olsen og Flóvin Þór Næs – Ólavur Simonsen, sum er nummar seks og Eyðun Nolsøe, sum er á tíggjunda plássinum.

John Rødgaard er tann í FM kappingini, sum hevur hægsta styrkistalið. Og eftir trý tey fyrstu umførini, sum vórðu avgreidd leygardagin og sunnudagin, var veteranurin og fleirfaldi føroyameistarin á odda. Eftir sigrar á Olafi Berg og Steintóri Rasmussen í tveimum teimum fyrstu umførunum og remis sunnukvøldið ímóti Hans Kristiani Simonsen var John Rødgaard einsamallur á odda við tveimum og einum hálvum stigi.

### Veteranarnir

Umframt John Rødgaard luttaka fleiri aðrir veteranar hesa ferð. Felags fyri teir allar er, at teir áður hava vunnið FM, og tað er eyðkent fyri fleiri teirra, at teir tey seinastu árini ikki hava gjørt so nógv við telvingina, sum teir onkuntíð hava gjørt tað. Her verður hugsað um Torkil Nielsen, sum á 19. plássinum er tann av luttakarunum í landsliðsbólkinum, ið er niðastur á styrkislistanum, um Jens Kristian Hansen, sum hesa ferð roynir at verja lokala felagið í besta bólkinum, og um teir báðar klaksvíkingarnar Steintór Rasmussen og Rana Nolsøe.

Felags fyri allar hesar og Boga Ziska er, at teir áður hava vunnið meistaraheitið fyri einstaklingar. Bogi er tann ein teimum, sum stóð seg best í trimum teimum fyrstu umførunum. Hann tapti í fyrsta umfarinum ímóti Martini Poulsen, men síðani vann hann á Torkili Nielsen og Rana Nolsøe.

Rani er tann, sum í trimum teimum fyrstu umførunum hevði soltnastu úrtøkuna. Tá ið hann seinnapartin í gjár við svarta fólkinum sessaðist yviri av Olafi Berg, átti hann framvegis fyrsta stigið á.

### Framtíðin

Í nógvum ítrótti eru árini á toppinum ikki so mong. Likamligi førleikin heldur ikki til kapping á hægsta støði. Í talvi er tað ikki soleiðis ella rættari, so nýtist tað ikki at verða soleiðis. Tað eru mong dømi um veteranar, sum hava hildið sær á toppinum, og – sum omanfyri nevnt – so var tað soleiðis eftir trý tey fyrstu umførini í Tofta skúla, at veteranurin og aldursforsetin í landsliðsbólkinum, John Rødgaard, var einsamallur á odda.

Um hann fer at megna at halda tørn um oddasessin, fara dagarnir fram til páskaaftan at vísa. At likamligi førleikin og konditiónin og harvið úthaldni hava stóra ávirkan á avrikini eru telvarnir greiðir yvir. John Rødgaard hevur áður sagt, at tá ið tú fyrireikar teg til kappingar, so er tað týdningarmikið at venja konditión. Umframt førleikan at telva fer konditiónin ivaleyst at gera av, hvør fer at standa við FM steypinum leygardagin.

Yngra ættarliðið er í landsliðsbólkinum umboðað av Hans Kristiani Simonsen, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Martini Poulsen og Olafi Berg. Hóast teir eru ungir, so hava teir longu verið við í fleiri ár. Allir teirra uttan Carl Eli hava longu roynt at vunnið FM fyri einstaklingar. Carl Eli er faktiskt tann einasti í landsliðsbólkinum, sum ikki hevur verið FM vinnari.

Tá ið telvararnir seinnapartin í gjár sessaðust fyri at fara undir fjórða umfarið, hevði Carl Eli framvegis góðan møguleika at sleppa á listan, sum hevur vunnið FM. Saman við Boga Ziska, Martini Poulsen og Hans Kristiani Simonsen hevði hann eitt hálvt stig minni enn oddafiskurin John Rødgaard. Carl Eli tapti í fyrsta umfarinum ímóti Hans Kristiani, men síðani vann hann á mammubeiggjanum, Rana Nolsøe, og so á Jens Kristiani Hansen.

Eftir sigurin á Carl Eli rakk Hans Kristian javnt ímóti Jens Kristiani og John Rødgaard. Martin Poulsen vann fyrst á Boga Ziska, og síðani telvaði hann javnt ímóti Olafi Berg og Steintóri Rasmussen.

Í gjár sá skráin soleiðis út: Hans Kristian Simonsen-Martin Poulsen, Jens Kristian Hansen-John Rødgaard, Steintór Rasmussen-Torkil Nielsen, Olaf Berg-Rani Nolsøe og Carl Eli Nolsøe Samuelsen-Bogi Ziska.

### Nógvir unglingar

Í fyrsta bólki var Eyðálvur Johannesen á odda við 2,5 stigum, og í unglingabólkinum vóru tríggir á odda við trimum stigum ella fullum stigatali: Rógvi Egilstoft Nielsen, Helgi Dam Ziska og Jón Gregersen. Kappingin er tøtt, tí tríggir vóru teimum á baki við 2,5 stigum. Teir vóru Oddur Højgaard, Heri Thomsen og Rógvi Dragaberg. Áhugin millum unglingarnar er stórur. 34 luttakarar eru í hesum bólkinum.

Støðan eftir trý tey fyrstu umførini í landsliðsbólkinum var henda: John Rødgaard 2,5 stig, Hans Kristian Simonsen, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Bogi Ziska og Martin Poulsen 2,0 stig, Torkil Nielsen 1,5 stig, Olaf Berg, Jens Kristian Hansen og Steintór Rasmussen 1,0 stig og Rani Nolsøe 0 stig.

## Støðan, landsliðsbólkurin

| | | |
|---|---|---|
| 1 | IM John Rødgaard | 2,5 |
| 2 | Hans Kristian Simonsen | 2,0 |
| 2 | Bogi Ziska | 2,0 |
| 2 | Carl Eli Nolsøe Samuelsen | 2,0 |
| 2 | Martin Poulsen | 2,0 |
| 6 | Torkil Nielsen | 1,5 |
| 7 | Jens Kristian Hansen | 1,0 |
| 7 | Olaf Berg | 1,0 |
| 7 | Steintór Rasmussen | 1,0 |
| 10 | Rani Nolsøe | 0,0 |

# Nevndin heldur fram

Ongar broytingar vóru í nevndini hjá ÍSB, tá aðalfundur varð hildin mikukvøldið

Á aðalfundinum hjá ÍSB, sum varð hildin seinasta mikukvøld, vóru ongar broytingar í nevndini. Jón á Steig og Johan Samuelsen stóðu báðir fyri afturvali, og vórðu teir einmælt afturvaldir. Eisini Mariann Øster, tiltakslimur, tók við afturvali, og stuðlaði aðalfundurin henni í hesum.

Semja var annars um, at talan hevur verið um eitt hendingaríkt ár. Ikki minst orsakað av Special Olympics, har Føroyar fyri fyrstu ferð tóku lut, og heimsmetunum, sum Heidi Andreasen setti.

**-jm**



Bólkur 2:

# Gøtumenn fult stigatal

**Fuglfirðingar smurdu TB av á Tvøroyri, og grannarnir úr Gøtu hava fulla úrtøku eftir trý umfør av bólkaspælinum**


*Gøtumenn eru framvegis einsamallir á odda í bólki´2, og hava teir nú mest sum vissað sær víðari luttøku*

*Mynd: Jonhard Hammer*

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Gøtumenn hava gjørt bart trý tey fyrstu umførini í bólkaspælinum í kappingini um Løgmanssteypið. Eftir tríggjar dystir hevur GÍ fult stigatal, og leygardagin var tað B68, sum noyddist at lúta fyri gøtumonnum. Í einum vánaligum dysti í Serpigerði vann GÍ 1-0 á B68, men talan var ongantíð um tað poleraða fótbóltsspælið, tí tað loyvdi veðrið snøgt sagt ikki. Tað var heimaliðið, ið hevði greiða yvirvág í spæli í fyrra hálvleiki, og tað var eisini fult uppiborið, at teir løgdu seg á odda beint fyri steðgin við einum máli, sum Leivur Hansen skeyt.
Eftir steðgin kom B68 betur við í dystin, og tað leikti mangan hart á framman fyri GÍ-málinum. Tí einu ferðina var ein B68 leikari púra einsamallur við málverjanum hjá GÍ, men misnýtti, og liðskiparin hjá toftamonnum, Øssur Hansen, sendi tí einu ferðina eitt hornaspark beinleiðis í tvørstongina. Nærri kom B68 tó ikki, og týðuligt var, at toftamenn saknaðu Súna Fríða í álopinum.

### ÍF smurdi TB av

Á Sevmýri vóru fuglfirðingar á vitjan hjá tvøramonnum. Fuglfirðingar vunnu í fyrsta umfari greitt á Toftum, men taptu síðani á heimavølli móti gøtumonnum, meðan TB hevði tapt móti GÍ og spælt javnt móti B68. Leygardagin var munurin á 1. og 2. deild tó rættuliga sjónligur, og fuglfirðingar vunnu ein sannførandi 5-0 á TB. Bartal Eliassen, sum nú eftir fleiri ár sum verjuleikari er farin fram í álopi at leika, var tvær ferðir á blettinum. Hann skoraði bæði til 2-0 og 3-0, eftir at Magni á Lakjuni hevði sett hol á. Tvøramenn gjørdu sjálvmál til 4-0, og móti endanum av dystinum var tað ungi Hanus Eliasen, sum setti punktum og skoraði til 5-0.

Í bólki 2 bendir alt á, at tað verða grannarnir GÍ og ÍF, sum koma víðari í steypakappingini, meðan toftamenn av álvara skulu taka sær um reiggj, um teir ætla at gera sær nakrar vónir um at koma í fjórðingsfinaluna.

GÍ-B68 1-0
1-0 Leivur Hansen

TB-ÍF 0-5
0-1 Magni á Lakjuni
0-2 Bartal Eliassen
0-3 Bartal Eliassen
0-4 Sjálvmál
0-5 Hanus Eliasen

Bólkur 3:

# VB smurdi meistararnar av

**Bólkur 3 gjørdist nakað nógv opnari eftir dystirnar um vikuskiftið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB hevði neyvan roknað við nøkrum løttum dysti, tá teir um vikuskiftið løgdu leiðina til Tvøroyri, har VB spælir sínar heimadystir, nú nýtt graslíki verður lagt á vøllin vesturi á Eiðinum.

Og tað skuldi eisini vísa seg, at VB ikki ætlaði at geva HB nakað sum helst. Fyrra hálvleik var spælbýtið annars hampuliga javnt, men hóast HB kanska hevði fleiri møguleikar, so tóktist VB vera sera vandamikið, tá teir ofta fingu yvirspælt HB úti á miðjum vølli, fyri síðani at seta ferð á.

Og vágbingar skoraðu eisini einasta málið fyri steðgin, tá nýggi álopsmaðurin, Mindegaus – hóast trýstur av fleiri leikarum – spældi væl inn til ein blankan Símun Samuelsen, sum langaði bóltin í málhornið.

Og eftir steðgin settu vágbingar ordiliga trumf á. Við leiðsluni í rygginum lág væl fyri hjá liðnum at spæla eyðkenda kontraspælið, og HB gjørdist ongantíð rættiliga vandamikið.

Tað gjørdist 2-0, tá Mortan í Hørg smekkaði til úr stórari fjarstøðu. Pól N. Joensen í HB-málinum helt ikki skotinum, og so var Dan Durhuus skjótur at fylgja upp. 3-0 gjørdist tað, tá Milan Kulic bæði byrjaði og endaði eitt vakurt álop, og Mindeaguas syrgdi við flottum einmansavriki fyri staðfestingini, tá hann eftir at hava rundað alla HB-verjuna legði bóltin fyri føturnar á Palla Augustinussen, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar av skumpa bóltin í málið og VB upp á ovasta plássið í bólki 3.

### Javnt á Skála

Á Skála vitjaði EB/Streymur, og tó at gestirnir tvær ferðir vóru á odda, so eydnaðist tað hjá heimaliðnum at fáa sítt fyrsta stig í bólkaspælinum.

Nakað av vindi var á Skála, men tó at gestirnir høvdu hendan ímóti fyrra hálvleik, so megnaðu teir at leggja seg á odda. Hetta hendi tá Hans Pauli Petersen smekkaði fríspark á tvørtræið, og áðrenn nakar á heimaliðnum varnaðist, hevði Sonni L. Petersen prikað bóltin í kassan.

Við vindinum ímóti sá tungt út hjá Skála undan seinna hálvleiki, men dómarin hevði ikki meira enn blást í floytuna, so hevði Alexandur Johansen javnað eftir fríspark beint uttan fyri brotsteigin.

20 minuttir fyri leiklok legði Sonni tó enn einaferð gestirnar á odda, eftir at Sorin Anghel hevði leikt hann leysan, men hetta gjørdist tó nyttuleyst, tá Hanus Thorleifsson í seinastu minuttunum langaði bóltin upp undir nettakið, eftir at gestaverjan ikki var nóg skjót at rudda burtur.

Ein lítil smeitur hjá EB/Streymi, sum tó enn er væl við í kappingini um atgongumerkini til fjórðingsfinaluna, meðan tað hinvegin sær nakað daprari út hjá Skála við bert einum stigi fyri tríggjar dystir.

VB-HB 4-0 (1-0)
1-0: Símun Samuelsen
2-0: Dan Durhuus
3-0: Milan Culic
4-0: Palli Augustinussen

Skála-EB/Streymur 2-2 (0-1)
0-1: Sonni L. Petersen
1-1: Alexandur Johansen
1-2: Sonni L. Petersen
2-2: Hanus Thorleifsson

# Fótbóltsstøður

## Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Esbjerg | 24 | 15 | - | 6 | - | 3 | 53 | 26 | 27 | 51 |
| 2 Brøndby (S) | 24 | 15 | - | 5 | - | 4 | 39 | 21 | 18 | 50 |
| 3 FCK (M) | 24 | 14 | - | 6 | - | 4 | 37 | 19 | 18 | 48 |
| 4 OB | 24 | 14 | - | 5 | - | 5 | 52 | 32 | 20 | 47 |
| 5 AaB | 24 | 10 | - | 7 | - | 7 | 35 | 31 | 4 | 37 |
| 6 FCM | 24 | 8 | - | 6 | - | 10 | 43 | 38 | 5 | 30 |
| 7 Viborg | 24 | 7 | - | 8 | - | 9 | 33 | 32 | 1 | 29 |
| 8 AGF | 24 | 8 | - | 3 | - | 13 | 34 | 48 | -14 | 27 |
| 9 Herfølge | 24 | 7 | - | 5 | - | 12 | 24 | 33 | -9 | 26 |
| 10 FC Nordsj. | 24 | 5 | - | 8 | - | 11 | 26 | 42 | -16 | 23 |
| 11 Frem | 24 | 5 | - | 3 | - | 16 | 25 | 45 | -20 | 18 |
| 12 AB | 24 | 4 | - | 2 | - | 18 | 19 | 53 | -34 | 14 |

**Føroyskir leikarar:** Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

## Danska 1. deild

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 18 | 14 | - | 1 | - | 3 | 33 | 12 | 21 | 43 |
| 2 Silkeborg | 18 | 12 | - | 4 | - | 2 | 37 | 14 | 23 | 40 |
| 3 Randers FC | 18 | 12 | - | 2 | - | 4 | 46 | 26 | 20 | 38 |
| 4 HFK Sønderj. | 18 | 11 | - | 3 | - | 4 | 47 | 21 | 26 | 36 |
| 5 Køge | 18 | 10 | - | 4 | - | 4 | 34 | 25 | 9 | 34 |
| 6 Skjold | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 37 | 32 | 5 | 27 |
| 7 Ølstykke | 17 | 8 | - | 1 | - | 8 | 37 | 34 | 3 | 25 |
| 8 Fredericia | 18 | 7 | - | 4 | - | 7 | 25 | 27 | -2 | 25 |
| 9 Nykøbing | 17 | 7 | - | 3 | - | 7 | 28 | 28 | 0 | 24 |
| 10 FC Nordjylland | 17 | 7 | - | 3 | - | 7 | 20 | 25 | -5 | 24 |
| 11 B 93 | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 26 | 31 | -5 | 17 |
| 12 Fremad Amager | 18 | 3 | - | 6 | - | 9 | 25 | 34 | -9 | 15 |
| 13 Vejle | 18 | 4 | - | 3 | - | 11 | 24 | 38 | -14 | 15 |
| 14 Brønshøj | 18 | 4 | - | 3 | - | 11 | 22 | 44 | -22 | 15 |
| 15 FC Aarhus | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 20 | 44 | -24 | 14 |
| 16 B 1913 | 18 | 1 | - | 5 | - | 12 | 13 | 39 | -26 | 8 |

**Føroyskir leikarar:** Christian Høgni Jacobsen, Ian Højgaard (Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Næstved | 18 | 11 | - | 3 | - | 4 | 40 | 17 | 23 | 36 |
| 2 Dalum | 18 | 11 | - | 3 | - | 4 | 45 | 27 | 18 | 36 |
| 3 Holbæk | 18 | 9 | - | 5 | - | 4 | 33 | 26 | 7 | 32 |
| 4 HIK | 18 | 9 | - | 5 | - | 4 | 35 | 29 | 6 | 32 |
| 5 B1909 | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 36 | 29 | 7 | 27 |
| 6 Slagelse | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 33 | 28 | 5 | 27 |
| 7 Kolding FC | 18 | 8 | - | 3 | - | 7 | 32 | 30 | 2 | 27 |
| 8 Jetsmark | 17 | 7 | - | 5 | - | 5 | 28 | 28 | 0 | 26 |
| 9 Brabrand | 17 | 6 | - | 5 | - | 6 | 32 | 26 | 6 | 23 |
| 10 Kalundborg | 18 | 6 | - | 4 | - | 8 | 41 | 43 | -2 | 22 |
| 11 Lyngby | 18 | 5 | - | 7 | - | 6 | 31 | 35 | -4 | 22 |
| 12 Holstebro | 18 | 6 | - | 3 | - | 9 | 32 | 36 | -4 | 21 |
| 13 Glostrup | 18 | 6 | - | 3 | - | 9 | 29 | 34 | -5 | 21 |
| 14 Hvidovre | 18 | 4 | - | 5 | - | 9 | 21 | 37 | -16 | 17 |
| 15 Skive | 18 | 4 | - | 3 | - | 11 | 32 | 41 | -9 | 15 |
| 16 Hjørring | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 21 | 55 | -34 | 14 |

**Føroyskir leikarar:** Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

### Bólkur 1

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 12 | 2 | 10 | 7 |
| 2 KÍ | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 6 | 4 | 2 | 5 |
| 3 NSÍ | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| 4 FSV | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 2 | 15 | -13 | 0 |

### Bólkur 2

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 9 |
| 2 ÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 6 |
| 3 B68 | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 7 | -4 | 1 |
| 4 TB | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 2 | 9 | -7 | 1 |

### Bólkur 3

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 8 | 2 | 6 | 6 |
| 2 HB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 4 | 6 | -2 | 6 |
| 3 EB/S | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 4 Skála | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 2 | 6 | -4 | 1 |